## DAGSINS MEINING

# Fólkaræðið undir trýsti

Ein og hvør, sum fylgir við tí, sum hendir í heiminum fyri tíðina, má ásanna, at fólkaræðið er undir einum ávísum trýsti. Hinvegin vita vit frá søguni, at fólkaræðið altíð hevur verið undir trýsti og er hesin standur so at siga ein natúrligur partur av sjálvari tí demokratisku stýrisskipanini. Fólkaræðið má tí alla tíðina vera á varðhaldi. Hetta er eisini galdandi fyri okkara politisku skipan. Orðaskifti ella dialogur, opinleiki og tollyndi eru lyklaorð, tá um demokrati ræður. Talufrælsi, skrivifrælsi og framsøgufrælsi eru sjálvsagdar fortreytir fyri fría vali borgarans, fyri tí umboðandi fólkaræðinum. Rætturin til at vera ósamdur er ein partur av grundvølli fólkaræðisins. Hinvegin er ta ein fortreyt fyri einum vælvirkandi fólkaræði, at orðaskiftið verður hildið á einum sakligum og sømiligum støði. Her má tíverri ásannast, at hetta ikki altíð er galdandi fyri politiska orðaskiftið í Norðurlondum og heldur ikki her hjá okkum.

Tónin í Føroyum er mangan harður ja, næstan hatskur hjá teimum, sum gera politiskar viðmerkingar og hjá ávísum politikkarum. Hetta gongur mest út yvir tey, sum ikki taka undir við fullveldispolitikkinum. Tónin og orðalagið gagna ikki demokratisku tilgongdini. Serstakliga gongur hetta út yvir Javnaðarflokk og út yvir fólk, ið verða hildin at hava samhug við hesum flokki. Til hesa myndina hoyrir so eisini hetta, at kunningin til almenningin um tað, sum fyriferst í politisku skipanini, er um at steðga upp. Tað tykist ikki sum samfelagstjak hevur áhuga. Í førum fáa vit ein einvegis tíðindaflutning úr landsstýrinum, sum í ávísan mun tykist vera politiskt stýrdur.

Sama rák hómast innan andslív og mentan, har tað tykist, sum tey, við teimum røttu politisku meiningunum, seta dagskránna. Tí spyrja nógv, um tað veruliga er so, at bert tey við rætta politiska litinum sleppa framat á alment stuðlaðum tiltøkum. Í hesum sambandi eigur at verða víst á vandan fyri einsrætting av føroyskum ands- og mentanarlívi. Tá listaverk verða ummæld tað verið seg bøkur ella onnur list, kann tað tykjast sum politiski litur listamansins ávirkar ummælini.

Tað er vanligt í einum fólkaræði, at eitt nú rithøvundar eru á varðhaldi og finnast at teimum ráðandi í samfelagnum. Men síðani fullveldistilgongdin byrjaði, hevur nærum ikki verið kritikkur av valdsharrunum frá teimum, ið annars ikki plaga at vera sein at finnast at einum hvørjum politiskum valdi. Tað hevur annars ikki skortað við tí, sum líkist maktmisnýtslu og minkandi rættartrygd hesi árini. Í staðin hevur heilt uttan orsøk verið lagt eftir eitt nú fakfelagsfólki og annars eftir fólki, sum ikki hava "røttu" hugsanina. Hetta er eitt ódámligt rák, ein polarisering av føroysku tjóðini, sum ikki gagnar fólkaræðinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fullveldi í beriposa (Frælsi í dós)

**Henrik Old**
*tingmaður*



Nú pressan boðar frá, at landsstýrissamgongan er samd um, at neyðugt er at leggja avgjald á beriposar fyri at bjarga inntøkur til landskassan, má botnurin verða náddur.

Hesin fittligi beriposin, sum hereftir blívur ein avgjaldsposi skal geva landskassanum 5 milliónir, og sum skilst so hevur hvør flokkur í sínum lagi leita dúgliga fyri at finna okkurt annað at koyra í avgjaldsposan. Higartil hava tey funnið drops, karamellir og sodavatn at koyra í posan og á tann hátt fáa nakrar milliónir frá fólki til landskassan at dekka eitt hall á fíggjarlógini við.

Í januar fekk hvørt húsarhald ein eykaskatt uppá 500 kr. í sjónvarpsgjaldi, umframt eitt eykagjald (serliga ætla barnafamiljum) tá politisk avgerð var tikin um at hækka mjólkaprísin útvið 1 kr. pr. litur.

Samtíðis var útgjaldið frá barsilsskipanini lækka, serliga til tey tímaløntu.

Tað er ófatiligt at fólkaflokkurin gongur við til slíkar eykaskattir, serliga tá hettar verður gjørt í eini tíð har nøgdirnar av fiski ið veiddar verða ongantíð hava verið størri enn tað sama, harumframt verður laksur í stórum nøgdum seldur av landinum.

Væl eru hvørki fiskaprísir ella laksaprísir naka at reypa av. Men harífrá og so til at seta krepputiltøk við eykaskatti í verk skal verða máti við.

Sjálvandi kann tjóðveldið ikki liva við eini fíggjarlóg, sum gevur hall slík inntøkuár.

Man kundi trú at fólkaflokkurin var væl fyri at staði ímóti avgjaldskravinum hjá tjóðveldinum við einum so frálíkum høgra bakki, sum sjálvstýrisflokkinum – men gakk.

Áhaldandi hava fullveldismenn og kvinnur roynt at fortelja Føroya Fólki at rikni fullveldispolitikkurin slettis ikki fór at merkjast hjá nøkrum. Við aðrir sum hava roynt at muta ímóti, hava verið róptir ræðuskítar, svarsíggjarar og tað ið verri er.

Bæði herheima og úr fullveldismiðstøðini í London hava rakstrarrópini verði hesi "Bíða bara, tað fara at koma nýggir spírar upp úr jørðini, bara sloppið verður av við blokkin".

Hvussu hevur so gingist við teimum nýggju spírunum, nú 5 ár eru liðin síðani amboðskassin var opnaður, jú framvegis eru 99% av okkara útflutningi fiskur – og enntá fer meira óviðgjørdur fiskur av landinum nú enn nakrantíð fyrr.

Ístaðin fyri áhaldandi dagligt stríð í samgonguni, so mátti tað verið onkur, sum heldur tók trupuleikan upp við tí nógva óviðgjørda fiskinum, ið fer av landinum. Er tað eingin í samgonguni, ið sær álvaran í at halda fram við sigldu fullveldiskósini tá tað er komi hartil at eykagjald á berposar er ein partur av bjargingini.

Tað verða helst fleiri enn eg, ið fara at lata beriposan liggja í frið í handlunum nú hann framyvir skal tryggja fullveldisgongdina.

# Lítil viðmerking til uppfatan Niels Una Dams av tí, í hansara verð, "fasistiska" Fólkaflokkinum?

**Torkil V. Rasmussen**

Hin heimskendi heimsspekingurin Niels Uni Dam (Mona Lisa) ger vart við seg og sína sosialistisku tankagongd í vikuskiftisblaðnum hjá Sosialinum hin 13 september, har hann skuldsetur fólkafloksfólk fyri at vilja hav a eitt klassasamfelag, har tey gomlu skuldu verði skotin, og tey fátæku skuldu fingi so ring kor, at tey umsíðir doyðu? Eg veit ikki hvar, ið Niels Uni Dam ætlar sær við slíkum tápuligum útsagnum um ein bólk av samfelagnum?

Tað er sjálvandi nemt at vera tann reina samvitskan hjá síni tjóð, tá ið man til konsertir rennur runt hálvnakin á pallinum framman fyri lítlum smágentum!

Heilt erligt, so visti eg ikki, at Niels Uni Dam var so svart/hvítur í sínum hátti at lýsa Fólkaflokkin og veljarar hans.

Tað er harmiligt at hoyra hvussu ræðulig vit fólkafloksfólk eru, tá ið hugsað verður um skattapolitikkin hjá flokkinum. At vilja geva pengar aftur til borgaran ístaðin fyri at fylgja vinstrahallum sentraliseringstankum um at seta eina nýggja nevnd ella onkran arbeiðsbólk til at gera okkurt tilmæli, og so gongur leiðin víðari upp í pappírsveldinum.

Eitt dømi uppá góðan nevndarsið er t.d. loyvisnevndin, sum var farin summarferiu aftaná eitt hart arbeiði um at tøma mineralvatn og kaffi í onkrum nevndarhølum, men sum enn ikki kann fáa fingurin úr bakpartinum til at geva t.d. Gallarínum á Áarvegnum eitt skeinkiloyvi.

Nokk um tað! Vit eru sjálvandi samdir Niels Uni um, at tað er púra ógjørligt at hugsa sær, at vit kundu spart og effektivisera ta almennu umsitingina, sum eftirhondini tykist at fara avstað við sínum stóra parti av skattapeninginum.

Skattalætti, skal eg fortelja tær Niels Uni, er ikki tað sama sum yvirhøvur ikki at gjalda skatt. Tíverri ert tú farin at mála hin versta á veggin, tá ið umræður skattalætta.

Trupulleikin er tann, at vit liva í einum samfelag, har tað almenna kostar ov nógv, men tað eru Per og ikki minst Pól, sum noyðast at slítast við tað. Kundu vit skori eitt petti av tí ov nógva rómanum, ið liggur omaná ta almennu køkuni, so kundi man givi teimum, ið hava goldið, eitt sindur aftur. Harvið gerst tað hugaligari at arbeiða.

Annars ætli eg mær ikki niður í nakrar smálutir, tí tað er so torført, tá ið fáast skal við ein persón, ið antinn sær hvítt ella svart, men møguligari verður tann trupulleikin burtur um nøkur ár, tá ið tú ert vorðin vaksin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Avriksløn

**Hans Jensen**
*Hvalvik*

Der er noget gribende ved angrende syndere, der med brødebetynget blik rejser sig i menigheden og bekender deres små menneskelige fejltrin, MEN –

At vi for åben TV-skærm skulle opleve nogle af samfundets mest forhærdede syndere – de offentlige kvinder og mænd – bryde sammen og tilstå, at de på trods af gode stillinger og lønninger ikke passer deres job 100% var en følelsesmæssig chokerende oplevelse. Stærk tobak.

Det må have været et meget stort emotionelt pres, de har levet under i årevis. Hvilken pine måned efter måned at være tvunget til at modtage fuld løn, vel vidende, at de kunne have gjort en større indsats til samfundets bedste. Nej – det har ikke været nemt.

Derfor er det ikke alene rosværdigt men også positivt, at de tør stå frem for Føroya Folk og sige, at vi har svigtet jeres tillid, vi angre og nu vil vi have løn eftir fortjeneste. Vi må respektere deres selvindsigt og tilgive dem.

Da man jo ikke kan gøre et job mere end 100%, kan jeg forstå, at man med »Avriksløn« har tænkt sig at justere lønnen nedad afhængig af effektivitetsgraden af den enkeltes indsats. Det lyder da fornuftigt, så jeg forstår ikke Kjartan Hansens betænkeligheder. Her er virkelig millioner at spare. Samtidig vil man kunne smadre sammenholdet i fagforeningerne og overflødiggøre lovgivning om arbejdsret.

Se – det er noget andet end de snoldede håndører, han kan få ind på børns helt livsnødvendige overforbrug af sodavand og slik.

# Ein samgonga á vegamóti

**Lasse Klein**



***Stríðsfúsir samgongumenn:** Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin kenna í dag eingi mørk. Løgtingi fær ikki longur boðskapin um málsviðgerðirnar fyrst. Landsstýrismenn leka tíðindi. Arbeiðshátturin skapar vanvirðing fyri politiska arbeiðinum, og skaðar arbeiði hjá journalistum í stóran mun, og teir smærru flokkarnir hava ikki orku at fylgja við, og fáa tí ikki eitt bein til jørðina. Hetta hevur einki sum helst við demokrati at gera, men hendan gongdin kann vissuliga ikki halda fram.*

Summir av tjóveldis- og fólkafloksmonnunum eru so bergtiknir av fjømiðlunum, at teir føla seg sum kongar, og servera dagsins rætt í fjømidlunum annan ella triðja hvønn dag.

### Fjølmiðlafólk kúgað og trælkað

Teir yvirtóku landsins stýri við eini ótrúligari idealismu fyri skjótt seks árum síðani og ruddaðu alt framman fyri sær við einari styrki, sum ikki var sædd aður, og teir samtyktu at halda fram í landsstýrinum á sama hátt, sum teir høvdu gjørt í andstøðu. Við somu atferð. Hetta er orsøkin til, at teir leka øll tíðindi. Løgtingi fær ikki longur boðskapin um málsviðgerðirnar fyrst. Landsstýrismenn leka til góðu vinir sínar í fjølmiðlaheiminum. Eingin virðing er fyri løgtinginum longur. Hesin arbeiðsháttur skapar vanvirðing fyri politiska arbeiðinum og skaðar arbeiði hjá journalistum í stóran mun. Fjølmiðlafólk hava verði noydd at funnið seg í at verða hongd út, kúgað og trælkað. Boðini eru greið: skrivar tú, sum vit vilja hava, so fært tú nakað. Um ikki, so er tín karriera í vanda.

Á sama hátt tykjast eisini mørkini hjá tænastumonnum landsins at verða tambað. Fyrr høvdu teir "stórar" avmarkaðar. Teir skuldu verða tignarligir, og røkja tænastuna uttan politiskar lótir. Teir skuldu tæna landsstýrinum – ikki einum politiskum flokki. Teir skulu verða til reiðar at tæna einum og hvørjum landsstýri, sum kom til aftaná eitt val, og teir skulu ansa væl eftir ikki at brúka skattaborgarans pening til flokspolitiskt endamál. Til ber bert at brúka skattaborgarans pening til at greiða frá, hvat endamál er við landsstýrisins politikki. Ikki at greiða frá hvussu ótrúliga góð ein landsstýrissamgonga er. Tað átti ikki at verði trupult at skilt.

### Illa dálkaður grundvøllur

Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin hava á hendan hátt áhaldandi vanvirt løgtingi, teir hava villleitt, og á ein ósakligan hátt eisini fjølmiðlarnir frá einari landsstýrisómsemju til aðra. Ein illa dálkaður grundvøllur er úrslitið.

Hetta er orsøkin til, at trúvirði er fokið á sitandi landsstýrissamgongu. Eftir seks árum er tað fáa fólk, sum trúgva einum einasta orði av tí, sum tjóveldis- og fólkaflokkurin borðreiða við. Teir hava lítið og einki trúvirði. Fólk hava fatan av, at teir handfara øll mál fyri egnan vinning.

Vit mugu ongantíð koma í tað grøvina, at vit fremja politiskt arbeiði, tí at tað kann selja. Vit arbeiða fyri politiskum sjónarmiðum, tí vit trúgva uppá tey. Ávísir politiskir flokkar eru meira upptiknir av, hvussu úrsliti verður, enn sjálvt innihaldið. Vit hava í Føroyum í dag eitt politisk tómrúm.

### Meiningsleysar og illavorðnar ósemjur

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava feiað sítt politiska hugsjónarstøði inn undir gólvteppið. Tær trongdu møguliga til endurnýggingar, men tær vóru hóast alt eitt politiskt hugsjónarstøði – ein trúgv, ein sannføring.

Sum støðan er í løtuni so trúgva Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin bert uppá sjúkliga handfaring av politiskum málum. Hetta hevur einki sum helst við demokrati at gera. Tað einasta, sum yvirhøvur minnir um demokrati, er, at val er av og á, og helst skal talan verða um afturval. Somu hugsan hevði Hitler eisini.

Vit hava ótallig dømir um politiskar ósemjur millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, sum eftir mínum tykki hava verði meiningsleysar og illavornar, og sum bert hava tænt einum einasta endamáli, og tað var at varpa ljós á Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin sum politiskir garpar, og á tann hátt forfjóna hinar samgonguflokkarnir.

### Ósemjurnar, illstøðurnar, rópini

Aftaná allar ósemjurnar, aftaná allar illstøðurnar, aftaná øll rópini er lítið sannlíkt, at nakað sum helst skilagott fæst burturúr, og sum vanligur borgari í hesum landið ber illa til at koma við góðum ráðum, tí tey verða bert vend ímóti einum sjálvum, men hendan gongdin kann vissuliga ikki halda fram.

Hinir samgongu-flokkarnir standa sum oftast á síðulinjuna og eygleiða, men hvussu leingi Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin finna seg í hesum leiklutinum, er ilt at meta um, men sum gongdin er í løtuni, so ber til at siga; at samgongan er á einum vegamóti.

# Eldrapolitikkur

**Sigvald Kristiansen**
*Skála, p.t. Tvøroyri*



Aftur nú sóu vit í bløðunum (Dimmalætting hósdagin), at veitingar, sum eldri hava fingið og eiga rætt til, enn einaferð eru tiknar burtur vegna sparingar.

Heimahjálpin var – tann tíð tað var – ein framúr góð skipan, sum allir pensjónistar, sum trongdu til hesa hjálp, vóru glaðir fyri.

Men so við og við er hendan hjálp skorin so nógv niður, at heimahjálpin nú næstan bert er ein viðfáningur.

Eg haldi, at tað eigur at talast at hesi mannagongd. Tað er gjørt áður. Sosialurin hevur eisini viðmerking til hetta í leiðara fríggjadagin og spyr, hvar pengarnir fara.

Ja, hvar fara pengarnir? Teir vísa seg ikki at koma brúkaranum til góða. Hvar fara teir so?

Pensjónistafeløg og eldrafeløg eiga at umhugsa at mótmæla hesi mannagongd, sum vísir seg við, at tað altíð fyrst verður tikið frá teimum veikastu, tá sparingar fara fram. Mótmæla hesum niðurskurðum av veitingum til óhjálpin eldri.

Eg vil vegna okkara lokala eldrafelag harðliga tala at hesum politikki. Eisini sum limur av nevndini í Landsfelag Pensjónistanna má eg mótmæla tí, sum fram er farið mótvegis pensjónistum.

Pensjónistar eru tolnir, teir einstøku orka ikki at mótmæla hesi framferð frá myndugleikunum. Men onkur má gera vart við seg.

Tíverri eru vit ov illa samskipaði, vit eldru, og tí hava vit kanska ov lítla ávirkan á umstøðurnar hjá okkum sjálvum. Vit høvdu megnað nógv meira, um vit stóðu saman sum ein bólkur mótvegis teimum, sum ráða fyri borgum.

Lyftir til tey gomlu tróta ikki upp undir val frá politiskari síðu, men skjótt eru hesi lyftir gloymd, sum eisini hendan síðsta hendingin við skerjingum av heimahjálpini ber prógv um.

Áheitan mín er tí til allar pensjónistar í Føroyum: Latum okkum fylkjast í eldrafeløg!

Tekna teg sum lim í lokala eldrafelagið ella pensjónistafelagið. Er eitt tílíkt á tínum heimstaði, so far til eitt grannafelag. Ella tak stig til at seta á stovn eitt eldrafelag, tú kanst fáa hjálp frá Landsfelag Pensjónistanna, sum umboðar øll eldrafeløg og pensjónistafeløg, sum vilja vera limur í Landsfelagnum.

Landsfelag Pensjónistanna kann so sum eitt sterkt felag tala søk pensjónistanna mótvegis myndugleikunum, so tørvurin hjá teimum eldru verður nøktaður og liviumstøðurnar hjá teimum betraðar.


**VARPIÐ**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2


# frøðiorðsyrking

tilverukroystarevini endurbinda
teg nú í afturbitssjógv -

ástvínberjalyklatyssið minnir um
fagurhondsútskorna- og vinarbands-
framvígslutrælkaða homlubandstyngd -

meðan trímannabitlarannið grætur í
atgongutrilvandi tilvildarmegi
sum listprýðisvevnaður syngur úr
glámlýsisgíggjandi muru

**chr.fróði**